# ítróttur

Nr. 238 • leygardagur • 13. desember 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Tey næstbestu kappast

**StÍF og Neistin skulu gera av, hvørt tað verða eitt ella trý lið, sum leggja seg næst Kyndli**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Annað umfarið á rað verður tað Neistin, sum er partur av mest avgerandi dystinum í bestu mansdeildini í hondbólti. Hetta tá teir fara til Skála at spæla dyst móti StÍF.

Sum støðan er í deildini, so verður tað hesin dysturin, sum ger av, hvørji lið skulu leggja seg næst at Kyndli. Verður tað Neistin, sum stendur sum vinnari, so verða teir saman við StÍF og VÍF javnir á øðrum plássinum. Verður tað hinvegin StÍF, sum heldur stigunum, so verða tað teir, sum leggja seg á annað plássið, meðan Vestmenningar og Neistamenn so leggja seg á teir báðar næstu sessirnar.


*Hoyvikingar eru teir einastu, sum hava vunnið á Kyndli higartil í ár, men tað søguna vilja teir á oddaliðnum helst ikki endurtaka*

### Tvær granna-uppgerðir

Alt hetta treytar tó, at VÍF vinnur sín dyst. Á pappírinum er heldur einki at ivast í, at VÍF eru favorittar móti KÍF, men teir skulu nokk vara sær fyri at taka alt ov lætt upp á uppgávuna.

Fyrst og fremst, so er talan um grannauppgerð, og bara tað í sjálvum sær hevur ofta við sær, at dystirnir verða væl tættari enn tað, sum stigatalvan annars boðar frá. Ein sannroynd, sum eisini VÍF hevur merkt.

Hartil kemur so tað, at kollfirðingar veruliga hava lyft spælið seinastu vikuna. Fyrst við einum púra óvæntaðum sigri á Neistanum, og síðani vóru teir um reppið at endurtaka hetta, tá StÍF var mótstøðuliðið mikukvøldið. Móti júst vestmenningunum er einki at ivast í, at kollfirðingarnir kanska eru eyka uppsettir, og tí bendir nógv á, at talan verður um alt annað enn lætta uppgávu hjá VÍF.

Løtt er uppgávan heldur ikki hjá Kyndli, hóast talan er um dyst millum fremsta og aftasta liðið í deildini. Í øllum førum hevur einasta tapið hjá Kyndli í kappingini verið fyri júst hoyvíkingunum, og tað er so púrasta víst, at teir í árstalsfelagnum heldur enn fegnir vilja endurtaka tann sigurin.

Tað skert tó ikki burtur, at júst tann dysturin var so nógv tann vánaligasti hjá Kyndli higartil í ár, og tað er einki at ivast í, at leikararnir vilja geva seg heilt nógv, til tess at forða fyri eini endurtøku av hesum. Hvørt tað so fer at eydnast, er ein onnur søga.

## Dystir um vikuskiftið

### Hondbóltur

1. deild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 13.12 | 15.00 | VB-Stjørnan |
| 13.12 | 16.00 | Søljan-Neistin |
| 14.12 | 14.30 | VÍF-StÍF |

1. deild menn

| | | |
|---|---|---|
| 14.12 | 16.00 | StÍF-Neistin |
| 14.12 | 16.00 | VÍF-KÍF |
| 14.12 | 16.00 | H71-Kyndil |

### Flogbóltur

Meistaradeild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 13.12 | 14.00 | ÍF-KÍF |
| 13.12 | 15.00 | TB-Dráttur |

Meistaradeild menn

| | | |
|---|---|---|
| 13.12 | 16.00 | Fleyr-Mjølnir |
| 13.12 | 16.00 | ÍF-Fram |

# Oddurin skal avgerast

**Í Vági verður oddabrak, og í Vestmanna skal VÍF royna at halda fastu um sína støðu**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Næst seinasta umfarið í grundspælinum hjá kvinnunum er á skránni um vikuskiftið, og eftir øllum at døma er hetta eisini umfarið, har tað verður gjørt av, hvat lið skal standa ovast, tá farið verður undir endaspælið.

Tað er sjálvandi ikki víst, at júst tað verður avgerandi brikkurin í tí spælinum, sum avger meistaraheitið, men hinvegin er heldur einki at ivast í, at báðir partar heldur enn gjarna vilja vera liðið, sum hevur nøsina undan hinum, tá stigini av álvara fara at telja.

Her hevur Stjørnan sum er fyrimunin, og í veruleikanum kunnu tær sum so munandi betri liva við einum tapi. Við hálveringini av stigum verður nevnliga rundað uppeftir, og so hava liðini bæði eins nógv stig, tá endaspælið byrjar.

Tað viðførir so eisini, at størsta trýstið undan dystinum ivaleyst liggur á VB. Tapa tær dystin, so eru nevnliga tvey stig upp til Stjørnuna, tá farið verður í holt við endaspælið. Triðji møguleikin er so sjálvandi, at talan verður um javnleik, men tað kunnu tær í Klaksvík so ikki brúka til nakað sum helst, og tí er einki at ivast í, at tær eins væl og heimaliðið fara eftir báðum stigunum leygardagin.

### Tey næstbestu mugu fylgja við

Á Giljanesi verður eisini dystur leygardagin, tá Neistin kemur á vitjan. Skal metast eftir pappírinum, so er einki at ivast í, at Neistin her er risa-favorittur at vinna. Við einum sigri her kann Neistin eisini halda fast í fjarstøðuni, sum er upp til oddaliðini, soleiðis at liðið eisini hevur eina grundaða vón um at leggja seg í heiðursmerkjastríðið eftir nýggjár.

Seinasti dysturin er í Vestmanna sunnudagin, tá StÍF kemur á vitjan. Fyrsta partin av kappingini var StÍF eitt av teimum liðum, sum hampuliga nógv varð roknað av, men seinastu vikurnar hava úrslitini tó verið so sum so. Tí er einki at ivast í, at VÍF eru favorittar, og hjá teimum er eisini neyðugt við tveimum stigum. Ikki minst nú í øllum førum annað av oddaliðunum fer at missa stig um vikuskiftið.



# Fýra favorittar

**Undan dystunum í bestu flogbóltsdeildunum um vikuskiftið tykist ikki stórvegis ivi at valda um útfallið**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fýra flogbóltsdystir verða leiktir um vikuskiftið, og felags fyri hesar er, at talan í hvørjum einstøkum føri er um greiðar favorittleiklutir.

Hjá kvinnunum tekur ÍF á heimavølli móti KÍF, og her er lítið at ivast í, at meistararnir ætla sær hevnd fyri tapið í fyrsta umfarinum. Tað hoyrir tó eisini við til søguna, at KÍF ta ferðina var væl betri mannað, enn tær eru nú, og tí er einki at ivast í, at hetta líkist eini yvirkomuligari uppgávu hjá ÍF.

Tað tykist tað eisini vera hjá TB, sum hesaferð tekur ímóti Drátti í høllini í Trongisvági.. TB tykist aftur í ár vera eitt av liðunum, sum skal stríðast um gullið, og í hesum dystinum fer Dráttur neyvan at standa teimum mát.


*Einki er at ivast í, at ÍF ætlar sær at hevna tapið, sum teimum var fyri í fyrsta umfarinum av flogbóltslandskappingini*

Eisini hjá monnunum er talan um tveir dystir. Í Havn kemur Mjølnir á vitjan hjá Fleyr, og her er ikki væntandi, at klaksvíkingarnir lata serliga nógv liggja eftir sær. Higartil í ár hevur Fleyr ikki vunnið sær eitt tað einasta stig, og at hugsa sær at hetta skal koma móti øðrum av oddaliðunum, er eitt sindur utopiskt.

Og tað man eisini vera støðan hjá Fram, sum vitjar hjá hinum oddaliðnum. Fuglfirðingar høvdu eina heldur trilvandi byrjan upp á árið, men síðani hava teir veruliga fingið ferð á, og sum støðan er á stigalvuni, so eru tað helst bara teir og klaksvíkingarnir, sum fara at stríðast um gullið. Og tað fer Fram helst ikki at gera nakað sum helst við.

## Hondbóltsstøður

### 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 10 | 8 - 1 - 1 | 249 | 184 | 65 | 17 |
| 2 | VB | 10 | 8 - 0 - 2 | 259 | 180 | 79 | 16 |
| 3 | VÍF | 11 | 7 - 1 - 3 | 271 | 236 | 35 | 15 |
| 4 | Neistin | 10 | 5 - 1 - 4 | 254 | 222 | 32 | 11 |
| 5 | StÍF | 10 | 4 - 1 - 5 | 234 | 257 | -23 | 9 |
| 6 | Søljan | 10 | 1 - 0 - 9 | 175 | 244 | -69 | 2 |
| 7 | Kyndil | 11 | 1 - 0 -10 | 173 | 292 | -119 | 2 |

### 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Kyndil | 9 | 7 - 1 - 1 | 267 | 241 | 26 | 15 |
| 2 | StÍF | 9 | 6 - 0 - 3 | 221 | 208 | 13 | 12 |
| 3 | Neistin | 9 | 4 - 2 - 3 | 254 | 235 | 19 | 10 |
| 4 | VÍF | 9 | 4 - 1 - 4 | 236 | 220 | 16 | 9 |
| 5 | KÍF | 9 | 2 - 1 - 6 | 220 | 261 | -41 | 5 |
| 6 | H71 | 9 | 1 - 1 - 7 | 204 | 237 | -33 | 3 |

## Flogbóltsstøður

### Meistaradeild, kvinnur

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mjølnir | 10 | 8 - 2 | 25 | 9 | 16 | 16 |
| 2 | TB | 9 | 7 - 2 | 24 | 6 | 18 | 14 |
| 3 | KÍF | 9 | 5 - 4 | 17 | 19 | -2 | 10 |
| 4 | Dráttur | 9 | 4 - 5 | 17 | 18 | -1 | 8 |
| 5 | ÍF | 9 | 3 - 6 | 10 | 19 | -9 | 6 |
| 6 | Fleyr | 10 | 1 - 9 | 7 | 29 | -22 | 2 |

### Meistaradeild, menn

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mjølnir | 7 | 6 - 1 | 18 | 3 | 15 | 12 |
| 2 | ÍF | 7 | 6 - 1 | 18 | 5 | 13 | 12 |
| 3 | SÍ | 8 | 4 - 4 | 14 | 14 | 0 | 8 |
| 4 | Fram | 7 | 2 - 5 | 8 | 16 | -8 | 4 |
| 5 | Fleyr | 7 | 0 - 7 | 1 | 21 | -20 | 0 |

# Høgh'urin við talentskúla

**Saman við Brian Laudrup fer málmansvenjarin hjá føroyska landsliðnum nú undir at venja evnaríkastu donsku unglingarnar**

MÁLMANSVENJARI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ætlanin hjá teimum báðum stjørnunum handan Laudrup & Høgh er at gera venjingarlegur við dreingjum í aldrinum, 16-18 ár, har hesir fáa møguleikan at venja undir somu umstøðum sum yrkisleikarar.

Í fyrstu atløgu er ætlanin, at talan verður um 30 leikarar, sum í eina lítla viku komandi summar hittast á ítróttaskúlanum í Oure, har fleiri føroyingar annars eisini hava havt uppihald.

Vónin er so sjálvandi, at hetta kann vera við til at menna framtíðar landsliðsleikarar hjá danska landsliðnum, og sambært teimum hava bæði DBU og landslisðvenjarin, Morten Olsen, givið ætlanum teirra positiv skoðsmál.


*Saman við Brian Laudrup fer Lars Høgh komandi summar undir eitt slag av fótbótlsskúla, har størstu donsku talentini eftir ætlan skulu vera við*

## Mjølnir á odda

Kvinnurnar hjá Mjølni vóru hóskvøldið í Havn, har tær høvdu dyst móti botnliðnum, Fleyr.

Tað var ikki væntandi, at Mjølnir skuldu fáa teir stóru trupulleikarnar í hesum dystinum, og soleiðis gjørdist heldur ikki. Við settúrslitunum, 25-10, 25-16 og 25-10, gjørdist talan um ein sera tryggan sigur til klaksvíkskvinnurnar, sum við hesum løgdu seg einsamallar á odda á stigatalvuni. Tær hava tó leikt ein dyst fleiri enn TB, sum um vikuskiftið fær vitjan av Drátti.

**-jm**

# Kaggin framvegis á vinnarakós

**- men við Klaksvíkar Klubba í hølunum**

BILLARD
*Billardsambandið*

Kappingin í oddinum í 1. deild í billard gerst alsamt meira spennandi. Tað eydnaðist Kagganum 1 at leggja seg á odda frá byrjan, og enn hevur tað so ikki eydnast nøkrum av hinum liðunum at taka Kaggan aftur. Tó so - Klaksvíkar Klubbi kemur skúmandi fram móti oddinum og liggur nú bara fýra stig aftanfyri. Og felagið hevur so eisini spælt eina kapping minni. Tað í sær sjálvum merkir í veruleikanum, at klaksvíkingar liggja best fyri í svinginum. Nr. 3 er Havnar Klubbi við 20 stigum. Tvørámenn hava 12 stig og Kaggin 2 4 stig.

Í 2. deild liggja klaksvíkingar á odda við 26 stigum. Teir liggja eisini nr. 2, nú teir hava tvey lið í kappingini. Kaggin er nr. 3, Havnar Klubbi nr. 4 og tvørámenn nr. 5

## Billardstøður

### 1. deild

| | | Dystir | Eygu | Miðal | Stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Kaggin 1 | 3 | 9746 | 18,05 | 38 |
| 2 | Klaksvíkar Billardfelag | 2 | 8674 | 24,09 | 34 |
| 3 | Havnar Klubbi | 3 | 10606 | 19,64 | 20 |
| 4 | Tvøroyrar Billardfelag | 2 | 5776 | 16,04 | 12 |
| 5 | Kaggin 2 | 2 | 5584 | 15,51 | 4 |

### 2. deild

| | | Dystir | Eygu | Miðal | Stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Klaksvíkar Billardfelag2 | 2 | 3758 | 10,44 | 26 |
| 2 | Klaksvíkar Billardfelag1 | 2 | 3358 | 9,33 | 18 |
| 3 | Kaggin | 2 | 3038 | 8,44 | 17 |
| 4 | Havnar Klubbi | 1 | 1588 | 8,82 | 11 |
| 5 | Tvøroyrar Billardfelag | 1 | 828 | 4,60 | 0 |